# Góðir brúktir bilar

**Nissan Almera 2.0 Diesel GX** reyður, árg 1996, 4 hurðar, km 90.000, fyrr 72.000,- **nú 59.000,-**

**Saab 9-3 TiD 2.2** svartur, árg 2001, 5 hurðar, km. 35.000 **195.000,-**

**Nissan Almera 1.8 Elegance** bláur, árg 2000, 5 hurðar, km 52.000 **99.800,-**

**Honda Accord 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 96.000, fyrr 155.000,- **nú 129.000,-**

**Nissan Primera 1.6 Player** svartur, árg 1995, 4 hurðar, km 139.000, fyrr 67.000,- **nú 59.000,-**

**Ford Escort** bláur, árg 1996, 4 hurðar, km. 54.000 **59.000,-**

**Peugeot 306 HDi, A/C** grønur, árg 2001, 5 hurðar, km 80.000 **119.000,-**

**Daewoo Leganza 2.0** grønur, árg 1998, 4 hurðar, km. 40.000 **99.000,-**

**Peugeot 306 Diesel 1.9** grønur, árg 1995, 3 hurðar, km. 162.000 **55.000,-**

**Daewoo Nubira 2.0** gráur, árg 1999, 4 hurðar, km. 103.000 **59.000,-**

**Opel Vectra 1.7 DT** reyður, árg. 1996, 4 hurðar, km. 195.000 **69.000,-**

**Renault Megane 1.6** grønur, árg 2000, 5 hurðar, km. 68.000 **98.000,-**

**Opel Vectra 2.0 DT Station Car** svartur, árg 1997, 5 hurðar, km. 182.000, *sýn 24/03/04* **nú 85.000,-**

**Hyundai Accent 1.5 AirCon** gráur, árg 2000, 4 hurðar, km 92.000 **nú 79.000,-**

**Opel Corsa 1.7DT Comfort** gráur, árg 2002, 5 hurðar, km. 28.000 **125.000,-**

**Skoda Octavia 1.6** gráur, árg 1997, 4 hurðar, km. 102.000 **99.000,-**

**Opel Corsa 1.2** grønur, árg 2002, 5 hurðar, km. 31.000 **v/mvg 99.000,-**

Gevið gætur: Bilarnir á listanum kunnu verða seldir
Fyrispurningar kunnu vera settir á telefon 34 54 00,
eisini ber til at senda teldupost til: nissan@nissan.fo
Bilarnir finnast eisini á: www.nissan.fo

Sosialurin 341800

**P/F Meinhardt Arge**

v/ Oyggjarvegin • Postsmoga 3171 • 110 Tórshavn • Tel. 31 61 61


LANDSVERKFRØÐINGURIN

# Søla av skervi og asfalti

Viðv. sølu frá skerv- og asfaltverkum okkara.

Sagt verður frá, at frá 1. juni 2004 ber til at nýta gjaldskort á hesum støðum:

Hundsarabotni
Lambareiði
Porkeri

Harumframt er nú møguligt at gjalda ígjøgnum heimabanka/heimagreiðslu.
Eisini er møguligt at gera vanliga flyting gjøgnum peningastovn.
Verður goldið við giro, er neyðugt at vísa girokvittan, tá ið vøran verður avheintað.
Serligu kvittanirnar, sum hava verið nýttar higartil, eru ikki neyðugar longur.

**LANDSVERKFRØÐINGURIN**

# Pedagogur og hjálparfólk

## til barnagarðin í Nes kommunu

**Til barnagarðin søkja vit eftir:**
**1 pedagogi at arbeiða 35 tímar um vikuna at byrja 16. august 2004.**
Á stovuni eru 23 børn í aldrinum 5-6 ár.
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
Byrjanarstig 10.

Um so er, at ongin pedagogur søkir, verður hjálparfólk sett í staðin.

**1 hjálparfólki 30 tímar um vikuna at byrja 16. august 2004.**
Á stovuni eru 23 børn í aldrinum 3-4 ár.
Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.
Byrjanarstig 1.

**Vit vænta at umsøkjarin:**
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevni og kann taka ábyrgd
- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

**Meiri fæst at vita**
um størvini við at venda sær til Ingrid Hansen leiðara á tlf. 448760.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu vera Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 16. juni 2004 kl. 12.00.

**Nes kommuna**


Gallarí Jinx



Malan Rubeksen
framsýning í juni

tel 317101 • jinx@jinx.fo

Sosialurin 341800


**Í dag er niðanfyri standandi sínámillum felag strikað úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. S/F 2750, S/F Tryggingarfelagið Føroyar, 100 Tórshavn.

**Í dag eru niðanfyri standandi partafeløg undir tvingsilsavtøku strikaði úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 307, Sp/f Feðgar, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2124, Sp/f frá. 6 oktober 1992, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. Sp/f 3114, Sp/f Vint, 100 Tórshavn.

**Í dag eru niðanfyri standandi feløg undir trotabúarviðgerð strikaði úr partafelagsskránni:**

Skrásetingar-nr. P/F 880, P/F Fossbankin, 100 Tórshavn.
Skrásetingar-nr. P/F 1217, P/F Hans Pauli í Horni, 360 Sandavágur.
Skrásetingar-nr. Sp/f 2911, Sp/f Ground Floor, 530 Fuglafjørður.
Skrásetingar-nr. Sp/f 3164, Sp/f 8. juli 2003, 100 Tórshavn.

**Í dag eru niðanfyri standandi feløg í likvidation strikaði úr partafelagskránni:**

Skrásetingar-nr. P/F 1832, P/F Røðin Skopunar Flakavirki, 240 Skopun.
Skrásetingar-nr. Sp/f 3426, Sp/f Drangar, 360 Sandavágur.
Skrásetingar-nr. P/F 3645, P/F frá 27. august 2003, 530 Fuglafjørður.

*Skráseting Føroya,*
*tann 27.05.2004.*
*Kristin Balle*


*Vit gera alt:*
*URTAGARSÐARBEIÐI*
*So sum:*
*Grasvallir, planting og viðlíkahald. Vit gera eisini tún við flísum ella oljugrúsi.*

*Vit seta gravsteinar upp.*

*Vit átaka okkum eisini graviarbeiði sum t.d. at skifta oljutanga og tilíkt.*

*SPYR - TAÐ KOSTAR EINKI!*

**Fa. Símun Dalsgaard**
Boðanesgøta · FO-188 Hoyvík
Tel 31 54 78 · Fartel 28 21 00
Fax 32 04 78


**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2677, Sp/f SHS, 100 Tórshavn.

**Viðtøkur broyttar:** 19.05.2004.
**Nýtt navn:** Sp/f AHJ 2004
**Strikan av hjánavni:** Sp/f Sethúsasølan

*Skráseting Føroya*
*tann 28. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag móttikið fusiónsætlan samsv. § 134 a í P/F- lógini:**

**A**. *Navn***:** P/F Taravík (P/F-nr. 1724), 700 Klaksvík.
og
**B**. *Navn***:** P/F Polarlaks (P/F-nr. 1868), 700 Klaksvík.

Harumframt hava vit móttikið váttan frá metingarmanninum samsv. § 134 c, stk. 4 í P/F-lógini.

*Skráseting Føroya*
*tann 28. mai 2004*
*Kristin Balle*

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3788
**Navn:** P/F Stiðin
**Adressa:** Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn

**Kommuna:** Tórshavn Kommuna
**Stovningardato:** 18.05.2004
**Viðtøkudato:** 18.05.2004
**Kapitalur:** Kr. 2.175.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kr. 2.175.000,00 í øðrum virðum til kurs 100.
**Stovnarar:** Simon P.F. Hansen, Spógvavegur 9, 100 Tórshavn og Trygvi F. Guttesen, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn.
**Nevnd:** Simon P.F. Hansen, Spógvavegur 9, 100 Tórshavn (formaður), Trygvi F. Guttesen, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn, Paula E.B. Hansen, Spógvavegur 9, 100 Tórshavn og Helena M. Guttesen, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn.
**Stjórn:** Trygvi F. Guttesen, Fjalsgøta 10, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av nevndarformanninum saman við einum stjóra, ella av nevndarformanninum saman við einum nevndarlimi, ella av allari nevndini saman.
**Grannskoðari:** Sp/f KPMG, statsaut. revisorar, Staravegur 17, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 01.01.2004 - 31.12.2004
**Endamál**: Endamál felagsins er at keypa, umsita og at útleiga fastogn og leysafæ, umframt annað virksemi íhesum sambandi.

*Skráseting Føroya*
*tann 28. mei 2004*
*Kristin Balle*

---



# Pedagogur til Dagstovnin í Fuglafirði

Til stovuna undir Hamri verður søkt eftir 1 pedagogi 35 t. viku, at byrja 1. august 2004.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Til stovuna í Króki verður søkt eftir 1 pedagogi 40 t. viku, at byrja 1. august 2004.
Starvið er á stovu við 12 børnum í aldrinum 0-3 ár.

Dagstovnurin er ætlaður 60 børnum, og er stovnurin skipaður í tvey hús við eini barnagarðsstovu og eini vøggustovu í hvørjum húsi.

Lønin verður sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya. Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Juliannu Næs leiðara tlf. 225222/444940.

Um eingin pedagogur søkir starvið, kunnu hjálparfólk verða sett fyribils.

Umsóknir saman við avritum av prógvum og viðmælum skulu vera býráðsskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 14. juni 2004 kl. 10.00.

Býráðið skilir sær rætt til at velja millum innkomnu umsóknirnar ella onga at taka.

Fuglafjørður 27. mai 2004

**Fuglafjarðar býráð**


# Álítandi fólk til Restaurant Marco Polo

Vit søkja eftir einum røskum og arbeiðssomum fólki, ið dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

Tú verður álitisfólk og fer at arbeiða í skiftandi vaktum.

Løn sambært avtalu.
Starvið verður sett skjótast gjørligt.

Vinarliga ring
31 34 30 ella 21 34 30

MARCO POLO

www.marcopolo.fo

Sosialurin 341800


# Landsliðsvenjari í hondbólti

Søkt verður eftir landsliðsvenjara til A-landsliðið hjá monnum í hondbólti. Seinasta freist at søkja er 4. juni 2004. Umsóknin skal sendast til:

**HSF**
**Postboks 1023 · 110 Tórshavn**
**Tlf. 319669**

WWW.SMYRIL-LINE.COM

## SMYRIL LINE SØKIR

# KT-fólk

## at arbeiða umborð á Norrönu

Arbeiðsuppgávan er fyrst og fremst at umsita søluskipanina OSCAR frá ADS Anker saman við núverandi KT-manninum umborð. Arbeiðsøkið liggur undir KT-deildini á landi, men meginparturin av arbeiðsuppgávunum eru sjálvstøðugar. Eisini skal tann, sum settur verður, kunna taka lut í dagliga rakstrinum av KT-umhvørvinum umborð.

KT-umhvørvið umfatar Windows ambætarar, arbeiðspláss og harafturat ymiskan net-útbúnað. Stýrisskipanirnar eru Windows 2000 og Windows XP. Onnur forrit eru m.a. MS Office, MS Exchange, bókingarskipan til skipsferðir v.m.

**Arbeiðsuppgávur:**
- Viðlíkahald av upplýsingum í OSCAR
- Umsiting av OSCAR
- Vegleiðing til OSCAR-brúkarar
- Net- og telduumsiting
- Aðrar KT-uppgávur eftir førleika og avlopstíð

**Persónligir eginleikar:**
- Nærlagni
- Støðufesti
- Hugur at ogna sær nýggjan førleika
- Kunna arbeiða á skipi
- Góð samstarvsevni

**Førleiki:**
- Drúgvar royndir innan KT og/ella søluskipanir
- Duga í minsta lagi enskt sum arbeiðsmál
- Í minsta lagi teldukoyrikort ella samsvarandi teldukunnleika
- Teldukunnleiki á hægri støði er ein fyrimunur
- Kunnleiki til skipanina OSCAR er ein stórur fyrimunur
- Royndir á sjónum er ein fyrimunur
- Kunnleiki til dátusøvn (t.d. SQL) er ein fyrimunur
- Góður kunnleiki til teldunet er ein fyrimunur

**Arbeiðstíð:**
Vanliga ein mánaða umborð og ein mánaða heima. Fyrstu tíðina kann tó gerast neyðugt at vera umborð longri til tess at fáa upplæring.

**Løn:**
Sambært avtalu.

Starvið verður at seta skjótast til ber.

Umsókn við CV, prógvum og skjalprógvum annars verður at senda til:

**Smyril Line**
**postboks 370**
**110 Tórshavn**
**Att.: Sámal Olsen, KT-leiðari**

Í seinasta lagi 10. juni 2004. Umsóknir eftir henda dag kunnu tó verða viðgjørdar, um serligar umstøður gera seg galdandi.

Meir fæst at vita við at venda sær til Sámal Olsen, KT-leiðara, á tlf. 345811 ella 214328, ella til KT-mannin umborð, Julius Djurhuus, tlf. 344992, ella við telduposti: it@norrona.fo.

J. Broncks gøta 37 · Postsmoga 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · office@smyril-line.fo

Sosialurin 341800

# Frá Kvívíkar Skúlastýrið

Kvívíkar Skúlastýrið bjóðar øllum foreldrum at næmingum, sum ganga í Kvívíkar Skúla til foreldrafund mikukvøldið 02. juni 2004 kl. 19.00 í Kvívíkar Skúla.

**Skrá:**
Ársfrágreiðingin

**Kvívíkar Skúlastýrið**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktarfrøðingar

Tvey føst fulltíðarstørv í skiftandi vaktum sum sjúkrarøktarfrøðingur eru leys at søkja á E3/E2 til setan 15. juni 2004, ella eftir avtalu.

E3 er ein medisinsk deild, við 7 seingjaplássum. Sergreinin á deildini er uppvenjing av sjúklingum við apopleksia cerebri og við dis. sclerosu. Arbeitt verður í tøttum samstarvi við røktarstarvsfólk, fysioterapeutar, ergoterapeutar og talupædagog. Dentur verður lagdur á gott samstarv við avvarðandi og við primertænastuna.

E2 er ein røktardeild við plássi fyri 10 eldri búfólkum. Vit ynskja starvsfelagar við huga og hegni til at taka sær av eldri fólki. Dentur verður lagdur á góðan moral, etisk virði, positiva menniskjaáskoðan og góð samstarvsevni.

**Vit kunnu bjóða:**
- góðar og dugnaligar samstarvsfelagar.
- góða upplæring
- eitt umhvørvi, har tú kanst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna sjúkrarøktina

Nærri fæst at vita um størvini við at ringja tlf. 304500 Monica Brickmann deildarleiðara, á lokal 6012, ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102, e-post asap@lsh.fo

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 15. juni 2004 kl. 12.00.

Skivlig umsókn, merkt »umsókn til starv«, við avriti av prógvum, CV, autorisation og viðmælum e.l. skulu sendast til

**Landssjúkrahúsið**
Óla Arge
Starvsfólkadeildin
FO 100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikka á leinkjuna »starvsfólk«.*

# Faroe Marine Products

**FO-520 Leirvík**

Í sambandi við útbygging og økt virksemi á virkinum verður við hesum søkt eftir:
- Smiði/handverkara,
- Arbeiðsfólki til skiftivakt at passa turkingina, truckloyvi krevst

Eisini verður søkt eftir:
- Vaskifólki til fabrikkina

Vinarliga setið tykkum í samband við okkum á telefon: 443399